# STUTTSØGU-FRYMIL

- **Ger ein stuttan** samandrátt av søguni.
- **Skipa søguna** í partar. Um søgan er long, kann vera hent at skipa hana í partar og gera yvirskriftir til hvønn partin.
- **Hvørji evni** viðger søgan?
- **Hvat ger søguna** spennandi? Hvar er hæddarpunktið í søguni?
- **Nær fara** hendingarnar fram? Lýs tíðina. Hvussu langa tíð gongur søgan fyri seg?
- **Hvar fara** hendingarnar fram? Lýs støðini.
- **Hvørjir persónar** eru við í søguni? Skipa persónarnar í høvuðspersónar og eyka-persónar. Lýs persónarnar, útsjónd, aldur, verumáta, greið frá viðurskiftunum millum persónarnar í søguni.
- **Sjónarhorn:** Hvør sigur søguna? Er frásøgufólkið ein eg– persónur, ein 3. persónur ella er frásøgufólkið alvitandi? Hvønn upplivir tú søguna ígjøgnum?

**FRYMILIN** er sera hentur, tá ið tú skalt greina og tulka eitt verk, men minst til, at tað er ikki altíð, at tú fært svarað øllum punktunum í frymlinum. Tú kanst meta frymilin sum ein amboðskassa, har tú nýtir tey amboðini, tær tørvar. Tey, sum tær ikki tørvar, letur tú liggja.



- **Hvør hevur skrivað** søguna? Hvat vita vit um høvundin?
- **Skrivingarlag:** Er teksturin lættur at lesa? Eru nógvar myndir og samanberingar? Eru nógvar náttúrulýsingar og persónslýsingar?
- **Hvør er boðskapurin** við søguni? Hvat vil rithøvundurin siga við søguni?
- **Set søguna í frásjón:** Kenna tit nakað aftur úr gerandisdegnum, sum eisini hendir í søguni?





# VYL-TALVA

**Ein VYL-talva vísir, hvat tú veitst um evnið. Talvan vísir eisini, hvat tú ynskir at vita meira um. Í seinasta teigi skrivar tú, hvat tú hevur lært, tá ið tú ert liðugur við evnið.**

| VEIT frammanundan | YNSKI at læra meira um | Havi LÆRT |
|---|---|---|
| Her skrivar tú tað, sum tú veitst um evnið.<br><br>Hetta skrivar tú **ÁÐRENN**, tú lesur tekstin. | Her skrivar tú um tað, sum tú vilt læra meira um. Hetta skrivar tú **ÁÐRENN**, tú byrjar at lesa tekstin. | Her skrivar tú um tað, tú hevur lært. Hetta skrivar tú **AFTANÁ**, at tú hevur lisið allan tekstin. |